LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office

Løgtingið

Svar
uppá

skrivligan fyrispurning nr. 109/2021 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Ingilín D. Strøm, løgtingsmanni, um javnstøðu í landssstýrinum

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Metir løgmaður, at tað er nøktandi, at eingin kvinna er landsstýrismaður í løtuni?
2. Heldur løgmaður, at javnstøða eigur at vera í landsstýrinum?
3. Ætlar løgmaður at gera nakað við manglandi javnstøðuna í landsstýrinum?

Svar:

Spurningur 1 – 3
Síðani aldarskiftið hava tað, við núverandi landsstýrið, verið sjey ymisk landsstýrið í Føroyum. Hesi hava havt skiftandi kvinnuliga umboðan.

Í landsstýrinum millum Tjóðveldisflokkin, Fólkaflokkin, Sjálvstýrisflokkin og Miðflokkin, sum sat frá 2002-2004, var ein kvinna í landsstýrinum.

Í landsstýrinum millum Javnaðarflokkin, Fólkaflokkin og Sambandsflokkin, sum sat frá 2004-2008 var eingin kvinna í landsstýrinum.

Í landsstýrinum millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldi og Miðflokkin, sum sat í 2008 vóru tríggjar kvinnur í landsstýrinum.

Í Landsstýrinum millum Sambandsflokkin, Fólkaflokkin og Javnaðarflokkin, sum sat frá 2008-2011 vóru tríggjar kvinnur í landsstýrinum.

Í Landsstýrinum millum Sambandsflokkin, Fólkaflokkin, Miðflokkin og Sjálvstýri, sum sat frá 2011-2015 var ein kvinna í landsstýrinum.

Í Landsstýrinum millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldi og Framsókn, sum sat frá 2015-2019 vóru fýra kvinnur í landsstýrinum.

Í Landsstýrinum millum Sambandsflokkin, Fólkaflokkin og Miðflokkin, sum situr nú, hevur tað í tíðarskeiðinum september 2019 – desember 2021 verið ein kvinna í landsstýrinum. Tó er eingin kvinna í landsstýrinum í løtuni, og hetta harmist eg um.

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office

Seinasta tíðarskeið, har eingin kvinna hevur verið í landsstýrinum, var sostatt tíðarskeiðið frá 2004-2008, tá Javnaðarflokkurin hevði leiðsluna.

Sambært stýrisskipanarlógini §27 stk. 2, er tað løgmaður sum tilnevnir landsstýrismenn. Siðvenja hevur verið, at henda tilnevning verður gjørt eftir uppskotið frá tí einstaka flokkinum, og um tey verða funnin fullgóð verða tey tilnevnd av løgmanni. Tað er mær kunnugt ikki komi fyri, at løgmaður hevur valt ein leist, har hann tilnevnir onnur landsstýrisfólk enn tey ein flokkur skjýtur upp. Ynskiligt hevði verið um allir flokkar framyvir í størri mun hugsaðu um javnstøðu, tá teir skjóta upp landsstýrisfólk.

Í Tinganesi, 14. januar 2022

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður